Málstrikan

# Um at útnytta

Fýra ungar gentur hava verið í Latínamerika og ferðast. Tað er djarvt gjørt, og til alla lukku komu tær aftur í øllum góðum. Tær greiða frá ferðini í einum av bløðunum og koma eitt sindur inn á klassamun og fátækt í summum av londunum, sum tær vitjaðu. Til dømis siga tær, at tær hava verið úti fyri, at fólk "vildu gagnnýta sær" av teimum....Hvat man hetta vera, hugsar tann bilsni lesarin. Hann óttast, at okkurt ótýggi hevur gjørt seg inn á genturnar, og kanska hevur beistið ætlað okkurt sexuelt....?Men so er ikki. Tað, sum er hent, er bara tað, at genturnar, sum vóru slopnar undan øllum vandum í tí fjarskotna Latínamerika, vóru so óheldigar, tá ið tær aftur vóru í føðilandinum, at tær duttu í eina óbrúkiliga orðabók. Tær vóru bidnar um at skriva okkurt um hesa minniligu ferðina, og so fingu tær brúk fyri at siga, at okkurt olmussudýrið "vildi útnytta tær", tí tær sóu út til at hava pengar. Tær gera so ta dáragerð at fara at kaga í orðabókina, og har finna tær út av, at "udnytte" kann eita "gagnnýta" (einki eitur at gagnnýta sær). Men hatta undarliga orðið kann ikki brúkast her. Vit kunnu kanska gagnnýta toskarhøvdini í Lorvík, so tey ikki fara til spillis. Men hjá hesum gentunum var talan um at útnytta, snýta, bedraga. Tær kundu eisini sagt, at tær høvdu varhugan av, at onkur fátækur hevði hug til at benytta sær av teimum.Men til alla harrans lukku brúktu tær ikki tað andskræmiliga "gera sær dælt av", sum málinvalidarnir annars tykjast at hava tikið til sín. (MT)

# Nýtt lív sum pensionistur



**Tá ið Birthe Klinte fór frá við eftirløn byrjaði ein nýggjur partur í lívi hennara. Nú skipar hon fyri ferðum til India og hevur sín egna máta at veita menningarhjálp**

## Eldralív

Randi Jacobsen
blaðmaður
randi@sosialurin.fo

Birthe Klinte, búði í árunum frá 1988 til 1995 í Føroyum, við tað at maður hennara, Bent Klinte, var ríkisumboðsmaður í Føroyum. Hon gjørdi tá steinprent saman við listarkvinnunum Jónu Rasmussen, Astri Luihn og Aase Bømler Olsen.

Hon hevur júst verið í Føroyum og vitjað.

- Eg vildi so fegin hitta tær genturnar aftur, sigur Birthe Klinte, sum kom at kenna nógv fólk, meðan hon búði í Føroyum.

- Eg má viðganga, at eg dugi ikki bara at vera pensionistur. Eg eri av tí ættarliðnum, sum ikki góðtekur, at lívið stegar upp, bara tí vit fylla 67 ár og fara av arbeiðsmarknaðinum, sigur Birthe Klinte.

Hon fór tí at lesa til psykoterapeut, og tann útbúgvingin tók fýra ár.

### Inniligt vinarlag

Eitt ár fóru Birthe og Bent Klinte ein túr til India, og hon smeltaði fullkomiliga fyri hesum stóra og øðrvísi landinum.

Beint sum hon kom á flogvøllin, møtti hon einum ungum blíðum manni, sum heilsaði henni við orðunum:

- Eg visti tað var tú, sum kom higar.

Hon hevði aldrin áður hitt mannin, men hetta gjørdist til eitt innarligt vinarlag millum tvey fólk. Eina danska tilkomna kvinnu og ein ungan indara.

Hálvt annað ár seinni fór Birthe Klinte aftur til India, og tá bað Masood, sum maðurin eitur, hana koma við til Kashmir.

Hon er komin at kenna alla familjuna hjá Masood, ein dámlig familja. Pápi hansara var skúlastjóri og er farin frá fyri aldur, men tey hava einki, sum eitur fólkapensjón. Tí noyðist Mahood at upphalda allari familjuni. So varð 26 ára gamli Masood, sum er útbúgvin í ferðavinnu, uppsagdur, og familjan var illa fyri fíggjarliga.

- Eg fann tí uppá at keypa turriklæði í Kashmir at selja í Danmark, og vinningin sendi eg til familjuna hjá Masood, sigur Bente Klinte.

### Ferðavinnusamstarv

Hon bjóðaði eisini Masood til Danmark. Áðrenn hann kom, skrivaði hon til fleiri ferðaskrivstovur og segði, at hon fekk vitjan av einum ungum indara, sum gjarna aftur vildi arbeiða í ferðavinnuni. Tvær ferðaskrivstovur vístu áhuga, og Mahood og Birthe Klinte komu soleiðis í samband við Le Voyage og Culture Adventure, sum m.a. skipar fyri ferðum til Grønlands og Íslands.

- Tá ið tey søgdu, at tey hugsaðu um eisini at gera ferðir til Føroya, bað eg um at sleppa uppí, sigur Birthe Klinte.

Masood er í samstarvi við Birthe Klinte við at byggja upp sína egnu ferðaskrivstovu, og hon fer við fólki úr Danmark til India, við smáum ferðaløgum. Onkrar ferðir hava yvirskriftina joga og meditasjón.

- Hetta er ordiliga stuttligt, og eg vænti, at fólk fara at taka væl ímóti okkara tilboðum. Vit skipa fyri útferðum og geva fólki nógvar ymiskar upplivingar. Vit ætla at búgva í tjaldum við Ganges, sigla á Ganges og so samstundis íðka joga, sigur Birthe Klinte.

Hon ger eina ferð til India 20 til 25. oktober og so aftur eina ferð í mars. Tey fara at búgva ymsa staðni, eitt nú í gomlum fyrrverandi kleystrum. Ein ferð til Inda kostar ikki tað stóra.

### Ævintýrland

Birthe Klinte er ógvuliga hugtikin av landinum, bæði so og so. Fyri hana er tað sum at vera í ævintýrlandi at ferðast í India.

- Tað er fátæksligt og ússaligt, og har eru fólk við ongum beinum ella ongum ørmum, men tað mást tú tola at síggja.

Vinir hennara eru muslimar, sum meditera. Teir halda seg kunna fáa samband við Gud, meðan tey enn eru á jørðini. Lívsfilosofi teirra byggir á sannleika og reinlyndi. Kanst tú ikki siga sannleikan, er betri at tiga.

Masood hevur eisini ætlanir um at fáa pening til vega, soleiðis at hann kann skipa fyri kappingum fyri ungar dreingir í hesum tí fátæka partinum av India, har tað eisini er so ófriðarligt. Eisini vil hann fegin hjálpa kvinnum, sum eru farnar upp um tey 30 árini. Saman við Birthe Klinte roynir hann at seta tær í gongd við at arbeiða og harvið fáa inntøku, soleiðis at tær klára seg og kanska finna onkran einkumann at gifta seg við, tí so gamlar kvinnur fáa onga medgift.

Birthe Klinte kann halda fram í tað óendaliga við at tosa um India, men týdningarmiklasti boðskapur hennara er, at lívið steðgar ikki, tá ið tú verður 67 ár og fer av arbeiðsmakrnaðinum. Um tú leggur í og hevur heilsuna, hevur lívið framvegis nógv at bjóða.

Sosialurin